GREINARØÐ



# ELEKTRIKARIN OG SJÓNLEIKARIN RIVU JARNTJALDIÐ

TAÐ KRAVDI STERKAR **PERSÓNLIGHEITIR**, TÁ KALDA **JARNTJALDIÐ** SKULDI TOGAST NIÐUR. MILLUM FLEIRI AÐRAR VÓRU TAÐ TVEIR **PÓLVERJAR**, SUM ÁTTU SÍN RISASTÓRA LEIKLUT, TÁ **MÚRURIN** IKKI VÍST SEG AT VERA SO **STERKUR** HÓAST ALT



KALDA KRÍGGIÐ

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Í einum samfelag, sum er grundað á arbeiðarahugsjónina, er ikki tørvur á einum fakfelag.

Í einum samfelag, sum er grundað á vísindaliga ástøði fyri allari framdrift, er ikki tørvur á eini kirkju.

Omanfyristandandi tesur eru á hvør sín hátt hornasteinar í kommunistisku samfelagsfatanini, og tí skakaði tað allan eysturheimin, tá súlurnar fóru at rilla.

Jimmy Carter og Leonid Brezjnev høvdu við SALT-semjuni sett hol á eina vápnaavdubbing, sum í besta føri tóktist kunna fastfrysta støddirnar á kjarnorkuvápnagoymslunum hjá USA og Russlandi. Men tá goymslurnar longu undan hesum vóru ríkiliga stórar til at spreingja jarðarknøttin í pinkupettir, kundi hvørki SALT-I ella ætlaða SALT-II gera nakran enda á kalda krígnum.

Og tær forðaðu ikki Sovjetsamveldinum í at nýta hermegi í royndunum at frelsa sosialismuna um allan heim. Tað høvdu teir gjørt í Kekkoslovakia í 1968, og tá teir gjørdu tað sama í Afghanistan í '80, økti tað spenningin somikið, at USA valdi at boykotta Olympisku leikirnar, sum hetta árið skuldu haldast í Moskva.

Hartil bar arabiska oljublokadan frá 1973 við sær, at Sovjetsamveldið sum stórur oljuútflytari áhaldandi kundi nýta ovurstórar upphæddir úr landskassanum til hermegir sína. Hetta samstundis sum USA av bæði fíggjarligum og politiskum ávum noyddist at skerja hernaðarútreiðslurnar við eini helvt.

## Elektrikarin

Búskaparliga stóð tó ikki so væl til hjá Russlandi, sum leiðararnir royndu at látast. Brezjnev og hansara menn høvdu í fyrsta lagi bygt áhaldandi útreiðslugildið á ein oljuprís, sum ikki kundi halda sær í allar ævir. Og hartil var russiski herurin um at koma í stórar trupulleikar í eitt nú Afghanistan.

Sum heild tóktist russiski aðalskrivarin ikki sum nakar sterkur leiðari við greiðum visjónum, og tað skapti rúm fyri øðrum leiðarum í bæði eysturi og vesturi at skaka kommunistisku sjálvsfatanina.

Í USA var ein fyrrvernadi sjónleikari, sum nú var radiovertur – Ronald Reagan – í ferð við at vinna sær mest sum ófatuligan popularitet við sínum greiðu sjónarmiðum um globalu støðuna. Í Onglandi vann Margareth Thatcher fram í stórum við sínum ultraliberalu búskaparsjónarmiðum. Og í Kina var Deng Xiaoping farin undir eina roynd við kapitalismu í einum landi, sum annars hevði kommunismu og maoismu sum grundarstein.

Og so var tað eisini lítli pólverjin úr Gdansk: Lech Walesa.

Longu í 1976 varð hann sagdur úr starvi sínum á skipasmiðjuni í býnum, tá hann royndi at skipa arbeiðsmenninar í fakfelag.

Tann 14. august í 1980 var aftur uppreistur á somu skipasmiðju. Stjórin royndi at sissa arbeiðsmenninar, tá Walesa brádliga stillaði seg á eina gravimaskinu við orðunum »minnist tú meg?«

Tvær vikur seinni var Solidarnoscs – Solidaritet – veruleiki. Stjórnarskipanin, sum segði seg byggja á alt tað, sum arbeiðarafjøldin stóð fyri, hevði fingið sína mótvekt í einum fakfelag.

## Sjónleikarin

Pennurin, sum Walesa skrivaði stovningarsamtyktina undir við, var prýddur við eini mynd av Johannes Paul II, páva.

Karol Jósef Wojtyla var upprunaliga sjónleikari úr Wadowice í Póllandi. Hann var fyrsti pávin, sum kom úr einum kommunistiskum landi, og treytaleysur næstrakærleikin var tað, ið fyrst og fremst eyðkendi tey nærum 27 árini, ið hann sat sum pávi.

Hann varð móttikin sum hetja, tá hann í 1979 vitjaði heimlandið, og fyri Walesa gjørdi tað allan munin, tá katólski leiðarin segði: "Óttist ikki. Broytið ímyndina av landinum – av hesum landinum.

Fram um so nógvar aðrar eginleikar, so var tað tó sjónleikaraevnini, sum gjørdu Johannes Paul II til nakað heilt serligt. Betur enn nakar av undanmonnum sínum megnaði hann at dramatisera kenslurnar á ein hátt, sum fólkið tók til sín. Eingin annar pávi hevur vitjað eins nógva staðni, sum hann gjørdi tað – í 129 londum. Og á hendan hátt vísti hann eisini, at fyri hann var vælferðin hjá øðrum fólki ikki líkamikið.

Tað var tó ikki øllum, ið dámdu eins væl framferðina hjá nýggja pávanum. Og serliga mundi tað fella harðrendum kommunistum fyri bróstið, at pávin, sum kom úr einum kommunistiskum landi, á henda hátt eggjaði til humanismu, til frælsið og til rættin hjá øllum at vera serstøk individ.

Tað er ongan tíð prógvað. Men tað er nógv, ið bendir á, at morðroyndin móti pávanum í mai mánaði 1981 var løgd til rættist av hernaðarligu fregnartænastuni hjá Sovjetrusslandi. Pávin var deyðanum nær, men ein fimm tíma long skurðviðgerð bjargaði lívi hansara.

## Avleiðingarnar

At siga at teir báðir pólverjarnir

**Keldur:**
Den kolde krig, John Lewis Gadd, 2005 Hitler and Stalin, Alan Bullock, 1992
Erindringer fra krig og genopbygning, Leonid Brezjnev, 1978 Perostrojka, Michael Gorbatjov, 1987
Stalin – Den røde zar og hans hof, Simon Sebag Montefiore, 2004 wikipedia